# – Fínasta slag við slíkum staði fyri ungdómin

**Virkishúsið fyri ung í Klaksvík er komið so mikið væl áleiðis, at tað fer at lata upp um tvær vikur.
Líkt er til, at ungdóminum í býnum dámar húsið væl og ætlar at gera brúk av tí**



*Fýra av ungu monnunum í Klaksvík sum hetta Virkishúsið fyri ung er ætlað - vinstrumegin: Rógvi Dragaberg, John Tróndheim, Sigurð Joensen og Karl Hansen. Teimum við lið stendur leiðarin fyri Virkishúsið, Beinta Árnadóttir Gregersen*

*Mynd: Snorri Brend*

UNGDÓMUR

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** – Jú, eg vænti at vit fara at koma ein túr forbí soleiðis av og á.

Tveir 15 ára gamlir klaksvíkingar eru staddir beint uttanfyri nýggja Virkishúsið fyri ung í býnum.

Teir hava hoyrt, at tað henda stórar broytingar inni í húsinum. Men sjálvir hava teir ikki verið her áður.

Innkomnir síggja teir, at innrættingini líður væl. At teir sterku litirnir eru komnir upp á veggin, og at fleiri av elektronisku tólunum hava funnið sítt pláss.

Í niðaru hæddini er eitt stórt felagsrúm og nøkur smærri rúm, og í miðhæddini eru bara smærri rúm, sum kunnu nýtast til mangt og hvat.

Enn er nakað av arbeiði eftir at gera, men kortini ikki meiri enn so, at tá hesin mánaðurin er hálvrunnin er ætlanin at lata ungdómshúsið upp.

– Jú, hetta sær ordiliga gott út. Fínasta slag, eru teir báðir - Rógvi Dragaberg og Sigurð Joensen – samdir um.

### Vitja av og á

Hóast arbeitt hevur verið við hesum Virkishúsinum í eina tíð, so hava teir báðir, Rógvi og Sigurð ikki hoyrt so nógv um tað.

– Vit hava hoyrt eitt sindur um tað frá onkrum, og vit hava lisið okkurt smávegis um tað, siga teir.

Teir eru kortini vitandi um nakað av tí, sum fer at sermerkja hetta Virkisshúsið. Ætlanin er nevniliga, at hetta skal verða eitt stað, har tað skal vera bæði stuttligt at koma og har ein hevur møguleika at læra ymiskt.

Og teir ætla sær eisini at gera nýtslu av hesum húsinum:

– Vit fara at koma inn her soleiðis av og á fyri at hugna okkum og fyri at hitta onnur fólk.

– Jú, tað er í fínasta lagi við hesum Virkishúsinum.

Ætlaða Virkishúsið skal verða eitt stað fyri ungdómin, har tey kunnu koma saman til ymisk tiltøk sum verða fyriskipað, og sum tey ungu sjálvi taka stig til.

### Sleisa

Rógvi og Sigurð ganga til dagligt í 9. flokki, og eru so upptiknir við tí ein part av degnum.

Í frítíðini finna teir uppá ymiskt – teir spæla eitt ávíst væl umtókt kortspæl, teir hyggja eftir filmum og so dámar teimum eisini væl at telva – serliga Rógva, sum er virkin telvari.

– Annars so sleisa vit bara runt í býnum, siga teir.

Óhugsandi er tí ikki, at telvingin verður ein partur av virkseminum í húsinum.

### Bíða eftir rætta navninum

Herfyri varð lýst út ein kapping um at finna eitt hóskandi navn til nýggja Virkishúsið fyri ung í Klaksvík.

Tá freistin var úti var ikki mett at nøvnini vóru nøktandi, og tí er einki avgjørt í hesum máli enn.

– Vit hava faktiskt ikki sett nakra tíðarfreist á. Vit bíða bara, til onkur kemur við rætta navninum, sigur leiðarin á Virkishúsinum, Beinta Árnadóttir Gregersen við Sosialin.

## Ætlanir um nýtt røktarheim

**Norðoyggjar:** Gongur so sum fimm av smærru kommununum í økinum ætla, so fer eitt nýtt røktarheim at verða bygt í nærmastu framtíð.

Hesar fimm kommunurnar – Viðareiðis, Húsar, Hvannasunds, Svínoyar og Kunoyar – hava sent eina umsókn til Almanna- og Heilsumálaráðið við umsókn um stuðul til eitt ellis- og røktarheim.

Kommunurnar hava hugt eftir eini kanning, sum varð gjørd um tørvin á slíkum heimi í Norðoyggjum. Og út frá hesum hava tær so tikið fyrsta stigið til tað, sum helst fer at enda við einum felags ellis- og røktarheimi í onkrari av hesum bygdunum.

Árni Absalonsen, bygdarráðsformaður á Viðareiði segði í sendingini "Heimabeitið" mánadagin, at teir ætla at gera hetta røktarheimið til 20 fólk.

– Men tørvskanningin vísti, at pláss eigur helst at verða fyri eini 32 fólkum, segði hann.

Hinvegin so er støða enn ikki tikin til, hvar hetta heimið skal liggja. Dult verður tó ikki fyri, at hetta helst verður í onkrari av bygdunum eystan Múla.

**sb**



*Óhugsandi er ikki, at eitt felagskommunalt ellis- og røktarheim kann verða bygt her á Viðareiði í nærmastu framtíð*

## Nýtt røktarheim eisini í Norðstreymoy

**Vestmanna:** Tað er ikki bert í Norðoyggjum og í Suðuroy at fólk tosa um bygging av røktarheimi.

Grannakommunurnar, Vestmanna kommuna og Kvívíkar kommuna, hava nú somuleiðis ætlanir um at gera tað sama.

Týsdagin í hesi vikuni sendu tær tí eina umsókn til Almana- og Heilsumálaráðið um stuðul til bygging av einum røktarheimi. Hetta skal byggjast í Vestmanna.

Verður hetta veruleiki, so verða tvey slík heim í Norðstreymoy. Um stutta tíð verður nevniliga røktarheimið í Streymnesi tikið í nýtslu.

**sb.**

## Stórur áhugi fyri íløgum

**Klaksvík:** Í kvøld skipar Føroya Banki í Klaksvík fyri serstakum tiltaki fyri tey, ið hava áhuga fyri virðisbrøvum og hvussu ein kann gera íløgur í hesi.

Lýst hevur verið við hesum tiltakinum, og sigast kann, at áhugin hevur verið sera stórur.

Tá vit tosaðu við Hans Petur Clementsen, deildarleiðara á miðdegi í gjár var ikki fullteknað. Men hann ivaðist onga løtu í, at tað fór tað at verða í kvøld.

– Jú, áhugin hevur verið sera stórur, og tí vænti eg, at eini 100 til 150 fólk verða við til tiltakið, sigur hann.

Á fundinum í kvøld fer m.a. fíggjarleiðarin Jan Jacobsen at greiða frá hesum áhugaverda evni, har høvið eisini verður at kjakast um evnið.

**sb.**



*Stórur áhugi millum klaksvíkingar fyri møguleikanum at gera íløgur í virðisbrøv*

# Børn á bíðilistan áðrenn flyting

**Klaksvíkar kommuna hevur gjørt eina samtykt sum lættir um hjá barnafamiljum, sum ætla sær at flyta hagar**

DAGRØKT

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Barnafamiljur, sum ætla sær at flyta higar, kunnu nú tekna børn síni til ansingarpláss frammanundan.

Hesin møguleikin hevur ikki verið áður. Men á býráðsfundi í farnu viku varð samtykt at broyta upptøkureglurnar fyri barnaansingina.

Hereftir verður skipanin soleiðis, at foreldur, sum hava ætlanir um at flyta til kommununa kunnu tekna børn teirra til ansingarpláss seks mánaðar áðrenn flutt verður í kommununa.

– Kravið um, at foreldur skulu búgva í kommununi, áðrenn børn teirra kunnu koma á bíðilistan til barnaansing, hevur gjørt tað sera óliðiligt hjá teimum, sum hava ætlanir um at flyta higar.

– Tí hevur verið neyðugt at gera hesar broytingarnar, upplýsir Jancy Biskopstø Klein, sosialdeildarleiðari.

### Neyðugt stig

Broytingin, sum nú er samtykt av býráðnum, snýr seg um at loyva foreldrum, ið hava ætlanir um at flyta til kommununa, at seta børn síni á bíðilista, áðrenn flutt verður.

Royndirnar hava víst umsitingini í Klaksvíkar kommunu, at tørvur er á, at foreldur fáa henda møguleika.

Tilmælið frá Sosialu Deild fekk eisini undirtøku frá fíggjarnevndini, áðrenn málið endaliga varð samtykt av býráðnum.

Tann broytta grein 1 í upptøkureglunum fyri barnaansingarskipanina er nú soljóðandi:

"Børn í aldrinum 0-9 ár kunnu koma á barnaansingarlistan hjá Klaksvíkar Býráð, um tey eru skrásett búgvandi í kommununi.

Tó kunnu ættleidd børn koma á bíðilistan, tá foreldur, ið ættleiða, kunnu vísa váttan, at teimum er ávíst serstakt barn.

Eisini kunnu foreldur, ið hava ætlanir um at flyta til kommununa, skriva seg á bíðilistan 6 mánaðir, áðrenn flutt verður til kommununa".